# Tjaldur aftur í oddadysti

## Ítrótturin um vikuskiftið:

| Eik-ligan, kvinnur | dagur | klokkan | dystur |
|---|---|---|---|
| FLOGBÓLTUR | 29/01 | 14.30 | ÍF - KÍF |
| FLOGBÓLTUR | 29/01 | 15.00 | SÍ - Mjølnir |
| FLOGBÓLTUR | 29/01 | 15.00 | Fleyr - TB |
| FLOGBÓLTUR | 30/01 | 13.00 | KÍF - Mjølnir |
| FLOGBÓLTUR | 30/01 | 15.00 | Ternan - Fleyr |
| FLOGBÓLTUR | 30/01 | 15.00 | SÍ - Dráttur |
| FLOGBÓLTUR | 30/01 | 15.00 | TB - ÍF |

| Eik-ligan, menn | dagur | klokkan | dystur |
|---|---|---|---|
| FLOGBÓLTUR | 29/01 | 15.00 | Mjølnir - TB |
| FLOGBÓLTUR | 29/01 | 16.30 | ÍF - Fleyr |
| FLOGBÓLTUR | 30/01 | 13.00 | TB - ÍF |
| FLOGBÓLTUR | 30/01 | 15.00 | Fleyr - SÍ |

| Sunset-kappingin | dagur | klokkan | dystur |
|---|---|---|---|
| HONDBÓLTUR | 30/01 | 15.15 | VB - Kyndil |
| HONDBÓLTUR | 30/01 | 19.00 | Stjørnan - Tjaldur |

| Atlantic Airways-kap. | dagur | klokkan | dystur |
|---|---|---|---|
| HONDBÓLTUR | 28/01 | 19.15 | Team Klaksvík - H71 |
| HONDBÓLTUR | 30/01 | 13.30 | Neistin - StÍF |
| HONDBÓLTUR | 30/01 | 16.00 | KÍF - Kyndil |

### Eik-ligan *kvinnur*

| NR. | LIÐ | DYSTIR | VUNNIÐ | TAPT | VUNNIN SETT | TAPT SETT | MUNUR | STIG |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Mjølnir | 12 | 10 | 2 | 33 | 9 | 24 | 20 |
| 2 | SÍ | 12 | 10 | 2 | 30 | 14 | 16 | 20 |
| 3 | Fleyr | 12 | 9 | 3 | 30 | 16 | 14 | 18 |
| 4 | TB | 12 | 7 | 5 | 25 | 22 | 3 | 14 |
| 5 | ÍF | 12 | 6 | 6 | 23 | 20 | 3 | 12 |
| 6 | KÍF | 12 | 3 | 9 | 13 | 32 | -19 | 6 |
| 7 | Ternan | 12 | 2 | 10 | 10 | 32 | -22 | 4 |
| 8 | Dráttur | 12 | 1 | 11 | 15 | 34 | -19 | 2 |

### Eik-ligan *menn*

| NR. | LIÐ | DYSTIR | VUNNIÐ | TAPT | VUNNIN SETT | TAPT SETT | MUNUR | STIG |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | ÍF | 13 | 11 | 2 | 35 | 11 | 24 | 12 |
| 2 | SÍ | 13 | 9 | 4 | 31 | 13 | 18 | 10 |
| 3 | Mjølnir | 13 | 7 | 6 | 24 | 21 | 3 | 7 |
| 4 | Fleyr | 12 | 5 | 7 | 17 | 25 | -8 | 5 |
| 5 | TB | 13 | 0 | 13 | 2 | 39 | -37 | 0 |

### Sunset Deildin *Kvinnur*

| NR. | LIÐ | DYSTIR | VUNNIN MÁL | TAPT MÁL | MUNUR | STIG |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Tjaldur | 15 | 430 | 344 | 86 | 25 |
| 2 | Stjørnan | 15 | 431 | 354 | 77 | 24 |
| 3 | Neistin | 16 | 437 | 367 | 70 | 24 |
| 4 | VB | 15 | 365 | 368 | -3 | 15 |
| 5 | Kyndil | 16 | 377 | 385 | -8 | 13 |
| 6 | VÍF | 16 | 364 | 447 | -83 | 6 |
| 7 | StÍF | 15 | 286 | 425 | -139 | 1 |

### Atlantic Airways Deildin *Menn*

| NR. | LIÐ | DYSTIR | VUNNIN MÁL | TAPT MÁL | MUNUR | STIG |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Neistin | 16 | 559 | 428 | 131 | 31 |
| 2 | KÍF | 15 | 429 | 386 | 43 | 21 |
| 3 | Kyndil | 16 | 413 | 411 | 2 | 17 |
| 4 | VÍF | 16 | 444 | 409 | 35 | 16 |
| 5 | H71 | 14 | 360 | 372 | -12 | 12 |
| 6 | StÍF | 15 | 371 | 385 | -14 | 9 |
| 7 | Team Klaksvík | 14 | 318 | 503 | -185 | 0 |

**HONDBÓLTUR** Kvinnurnar hjá Tjaldri, sum akkurát vunnu upp land ímóti Neistanum sunnudagin, skulu nú spæla á útivølli ímóti Stjørnuni

Hilmar Jan Hansen

Oddastríðið í Sunset-kappingini stendur í vetur millum trý lið, sum í nógvar mátar tykjast púra jøvn. Tí er spenningurin eisini stórur, tí bara tvey av teimum sleppa í FM-finaluna, tá landskappingin er lokin.

Sunnudagin var Neistin trý mál á odda ímóti Tjaldri í Runavík, men tapti kortini við einum máli, tá Tjaldur kom sterkt aftur ímóti endanum. Og nú sunnukvøldið verður aftur ein uppgerð millum tvey av teimum fremstu, tá Stjørnan í Klaksvík tekur ímóti Tjaldri. Vinnur Tjaldri, fer liðið trý stig framum, men vinnur Stjørnan, eru tey trý liðini framvegis í einum tøttum fylgi.

Higartil í vetur hava Stjørnan og Tjaldur spælt tvær ferðir ímóti hvørjumøðrum, og liðini hava vunnið hvør sín dyst. Dagsformurin verður avgerandi í Klaksvík sunnukvøldið, og óansæð, hvussu tað spælir av, verður hvørki av liðunum hektað av, tí eitt annaðpláss røkkur eisini í finaluna.




*Tá Tjaldur sunnukvøldið fer til Klaksvíkar at spæla ímóti Stjørnuni, er tað annar toppdysturin á røð hjá teimum gulu, ið við sigri kunnu fara trý stig framum*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

### Kyndil síðsta kjans

Í Atlantic Airways-kappingini hjá monnum hevur tað mestsum alla tíðina snúð seg um Neistan og hini, men fremst av »hinum« hevur alla tíðina verið KÍF, ið framvegis hevur besta møguleikan at sleppa at spæla sína fyrstu FM-finalu nakrantíð.

Næsti kappingarneytin hjá kollfirðingum er Kyndil, og tað verða júst hesi bæði liðini, ið bresta saman í Kollafirði sunnudagin. Her er treytirnar serliga harðar hjá Kyndli, tí verður dysturin ikki vunnin, er KÍF brádliga seks stig frammanfyri, nú kappingin so spakuliga er farin at halla.

KÍF vísti styrki í seinna hálvleiki ímóti VÍF sunnudagin, tá sigurin hjá kollfirðingum merkti, at finaluvónirnar hjá VÍF møguliga fingu sítt endaliga skot fyri bógvin. Nú er so upp til teir í KÍF at vísa, at teir eisini ímóti Kyndli megna tað sama, og tá ber næstan til at siga, at kollfirðingar hava troka annan fótin inn um finalugáttina.

*hilmarjan@sosialurin.fo*

# Nógvur flogbóltur

**FLOGBÓLTUR** Ikki færri enn 11 dystir eru um vikuskiftið í Eik-ligunum hjá kvinnum og monnum í flogbólti

Hilmar Jan Hansen

Fyri skjótt tveimum vikum, tá tríggir fimtingar av kappingini í Eikliguni hjá monnum vóru spældir, vórðu stigini býtt í helvt, og tá dystirnir um vikuskiftið hjá kvinnum eru spældir, verða stigini hjá teimum eisini býtt í helvt.

Hetta gevur serliga teimum liðum, sum í løtuni eru eitt sindur aftan fyri oddasessin, ein nýggjan møguleika at nærkast, men neyvan broytir hetta kortini stórvegis um støðuna. Hjá monnunum er eitt umfar spælt síðani stigini har fóru í helvt, men støðan er stórt sæð tann sama sum áðrenn – bara er munurin millum liðini eitt sindur minni.

Bæði hjá kvinnum og monnum eru dystir bæði í morgin og sunnudagin, so teir verða nokk so nógvir tilsamans, heilir 11 í tali. Tríggir dystir eru í Eik-liguni hjá kvinnum í morgin og fýra sunnudagin, og hjá monnunum eru tveir dystir hvønn dagin.

### Fleyr í lykladystum

Hjá kvinnunum eru tað serliga Mjølnir og SÍ, ið hini liðini royna at fáa fatur í, og har er Fleyr tað einasta liðið, ið veruliga er í nánd, tí Fleyr er bara tvey stig aftan fyri hini bæði. Síðani er eitt langt lop niður til TB, sum í løtuni er seks stig frá oddasessinum.

Annað av oddaliðunum báðum verður helst yvirhálað, tí SÍ og Mjølnir møtast í Sørvági í morgin, og sunnudagin spæla tey ávikavist heima ímóti Drátti og úti ímóti KÍF, ið hvørki kann metast sum ein beinleiðis hóttan, tí tey bæði liðini eru so langt frá toppinum á stigatalvuni.

Fleyr og TB møtast eisini, og tað er eitt slag av síðsta útkalli hjá TB, skal liðið endurtaka finaluna frá í fjør, samstundis sum hetta er eitt gylt høvi hjá Fleyr at nærkast oddinum.

Hjá monnunum skal Fleyr spæla ímóti teimum báðum fremstu, og tað er eisini eitt slag av »vinn ella forsvinn«, tí tapir Fleyr teir báðar dystirnar, er finalukjansurin fokin. Mjølnir, ið er nærri teimum báðum fremstu, tekur á heimavølli ímóti TB, ið skuldi verið yvirkomilig mótstøða. Men so skal eisini nevnast, at tey bæði settini, TB hevur vunnið í vetur, bæði eru vunnin ímóti Mjølnir.

*hilmarjan@sosialurin.fo*